Kristina Háfoss
løgtingsmaður

Nr. 85/2019

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur, um landsstýrismaðurin góðtekur, at peningastovnar seta krav til fólk í Føroyum um at nýta danska NemID, settur landsstýrismanninum í umhvørvis- og vinnumálum, Helga Abrahamsen (at svara skrivliga eftir TS § 52a).

1. Heldur landsstýrismaðurin, at tað er rætt at seta krav um, at fólk í Føroyum skulu útvega sær danska NemID fyri at kunna nýta netbanka og lønarportal í Føroyum?

2. Fer landsstýrismaðurin at taka stig til at fáa semju við føroysku peningastovnarnar um at sleppa kravinum um, at fólk í Føroyum skulu nýta danska NemID?

a. Um ja, nær verður málið tikið upp við peningastovnarnar?

b. Um nei, hví góðtekur landsstýrismaðurin hesa støðu?

Viðmerkingar:

Higartil hava fólk í Føroyum kunnað valt ímillum tvær talgildar lyklaloysnir, tá netbankin og lønarportalurin í Føroyum skulu nýtast. Men føroysku peningastovnarnir hava nú boðað frá, at skulu fólk í Føroyum nýta netbanka og lønarportal í Føroyum eftir 29. mai, krevja teir, at danska NemID loysnin – ein loysn, ið enntá verður avtikin í næstum í Danmark – verður brúkt.

Samstundis er føroyski Talgildi Samleikin nú liðugt mentur, og verður tikin í nýtslu seinni í ár. Nógv fólk í Føroyum hava ikki ynskt at nýta danska NemID og nýta tí aðra loysn, til Talgildi Samleikin er tøkur. Tí eru spurningar settir landsstýrismanninum í umhvørvis- og fíggjarmálum um málið.

Í svari upp á § 52a spurning nr. 72/2019 um føroyska Talgilda Samleikan, netbankan og danska NemID svarar Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, m.a., at: *"Tað er óheppið fyri Talgildu Føroyar, at avtøkan av Cryptomatic (gomlu innritanini) kemur næstan samstundis, sum fari verður undir at íverkseta føroysku loysnina kallað Samleikin."* Eisini vísir landsstýrismaðurin á: *"Avbjóðingin er sostatt, at nøkur mugu skifta tvær ferðir innan rímiliga stutta tíð – umleið 1 ár. Tað hevði sjálvandi verið lættari fyri Talgildu Føroyar, um hesi sluppu undan at skifta tvær ferðir."*.

Men til spurningin: "Fer landsstýrismaðurin at taka stig til at fáa semju við føroysku peningastovnarnar um at sleppa kravinum um, at fólk í Føroyum skulu nýta danska NemID?" svarar

landsstýrismaðurin í fíggjarmálum ikki, men vísir til, at landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum eigur at svara hesum.

Spurningurin verður tí hervið settur landsstýrismanninum í umhvørvis-vinnumálum.

Á Løgtingi, 13. mai 2020

Kristina Háfoss